Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: ADHD heilivágur

Spurningar:

1. Hvør kann útskriva ADHD heilivág í Føroyum?
2. Hvussu nógv fólk hevur vaksinpsykiatriin útgreinað fyri ADHD, og hvussu nógvan heilivág hevur hon útflýggjað um árið síðani 2016?
3. Hvussu nógv børn og ung hevur barna- og ungdómspsykiatriin útgreinað fyri ADHD, og hvussu nógvan heilivág hevur hon útflýggjað um árið síðani 2016?
4. Er tað møguleiki at fáa útgreinað tøl fyri, hvussu nógv psykiatriin hevur útskrivað av heilivági og býtt á sløg umframt somu tøl fyri privatpraktiserandi síðani 2016?

Viðmerkingar:
Langir bíðilistar til útgreiningar fyri ADHD fáa fólk at leita sær privata útgreining. Tí ber illa til at siga, hvussu nógv hava fingið staðfest diagnosuna í Føroyum seinastu árini. Hagtølini vísa, at eini 70% - 80% av teimum við diagnosini fáa ágóðan av heilivági. Harumframt er áhugavert at kanna lutfallið av heilivági, sum er útflýggjað frá almennu psykiatriini og privatpraktiserandi psykiatarum. Fyri at fáa lýst økið, ynski eg at fáa svar á hesar spurningar.

Á Løgtingi, 21. oktober 2021

Djóni Nolsøe Joensen